e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið alt um ítróttin um vikuskiftið í Ítróttar-Sosialinum týsdagin**

**www.sosialurin.fo**

## Hondbólturin um vikuskiftið

*Størsti spenningurin undan vikuskiftinum man helst vera um, hvussu tað fer at gangast suðuri i Vági, har VB kvinnurnar skulu taka ímóti teimum frá Neistanum*

Jákup Mørk

Fimm dystir verða leiktir í bestu deildunum hetta vikuskiftið, og verður sæð burtur frá omanfyrinevnda dysti í Vági, er lítil og eingin ivi um, hvønn veg stigini fara.

**Kvinnurnar**
Tveir dystir verða leiktir hjá kvinnunum hetta vikuskiftið, og sum nevnt omanfyri, so man størsti spenningurin vera um úrslitið suðuri í Vági.

Seinastu umførini hevur Neistin togað seg væl upp eftir á stigatalvuni, og nú munnu tær av álvara hava fingið ferilin av heiðursmerkjum. Hinvegin er tað samstundis um at verða seinasta útkall fyri VB, um tær skulu gera sær nakrar vónir um heiðursmerki.

Somu liðini dystast eisini um annan finalusessin í steypakappingini, og har eydnaðist tað Neistanum at vinna fyrra dystin við einum máli, so útlit eru fyri einum spennandi dysti.

Hin dysturin hetta vikuskiftið verður í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti Tjaldur. Higartil hevur ikki eydnast hjá runavíkingum at fáa nakað stig, og útlitini undan hesum dystinum munnu heldur ikki vera nakað serlig.

**Menninir**
Á mannfólkasíðuni verður talan um dystir hetta vikuskifti, og í øllum trimum førunum er talan um uppgerðir, har eitt av oddaliðnum tekur móti eitt av botnliðunum.

Í Havn dystast H71 og Neistin, og hóast talan er um lokaluppgerð, so man lítil og eingin ivi vera um, hvønn veg stigini fara.



*Spennandi verður at vita, um VB genturnar megna at basa Neistanum hetta vikuskiftið*

## Rumeni til HB

*Gongst eftir ætlan, fer eldra havnarfelagið at styrkja um hópin við útlendskum leikara*

Jákup Mørk

Tá HB venjarin, Ion Geolgau í komandi viku kemur aftur til Føroya, hevur hann ætlandi eisini ein landsmann við.

Talan er um ein rumenskan álopsleikara, sum, um alt gongst eftir ætlan, skal leika við HB í kappingarárinum, sum nú stendur fyri durum.

Gunnar Mohr, formaður í HB, sigur við Sosialin, at felagið enn ikki hevur gjørt sáttmála við leikaran. Orsøkin til hetta er, at teir vilja síggja, hvat leikarin stendur fyri, áðrenn nakar sáttmáli verður skrivaður.

**Mist nógv**
HB er annars eitt av teimum feløgum, sum seinastu tíðina hevur mist ein stóran part av leikarahópinum.

Sammett við hópin, sum fyrraárið vann felagnum FM-heitið og Løgmanssteypin, eru einir 10 leikarar, sum ikki eru at síggja í fremstu røð longur, og sum vera man er hetta ein frágongd, sum merkist í avrikunum.

Seinasta ár endaði liðið á fjórða plássi í landskappingini, og hetta er í hvussu so er ikki nakað, sum hóvar áskoðarunum hjá sigursvanda felagnum.

Higartil hevur eisini verið sera smátt við tilgongd av leikarum, og boðini frá leiðsluni hava eisini verið, at nú skal í nógv størri mun satsast upp á yngru leikararnar í felagnum.

## Toppur og botnur hittast

*Flogbóltur: Oddaliðini í báðum teimum ovastu deildunum skulu hetta vikuskiftið spæla móti botnliðunum. Men aðrir dystir eru tó, sum uttan iva kunnu gerast spennandi*



*Líkt er til at kvinnurnar hjá Mjølni ikki verða tiknar í ár*

Sveinur Tróndarson

Av tí at tað er kapping fyri yngru deildirnar í Klaksvík leygardagin, verða allir dystirnir í meistaradeildini leiktir sunnudagin.

Seinasta vikuskiftið kom Fleyr í ta støðu, at kvinnuliðið ikki kundi mannast tá tað skuldi til Tvøroyrar at hitta TB, men tað tykist, sum tey viðurskiftini eru komin upp á pláss. Sum Sosialurin skilir var ætlanin, at dysturin skuldi spælast í gjárkvøldið, men hann er fluttur til seinni, eisini orsakað av Mjølnirkappingini fyri tey yngru.

**Oddaliðini í Fuglafirði**
Oddaliðini í báðum deildunum skulu um vikuskiftið spæla móti ÍF. Við tí spæli, sum Mjølnir í kvinnudeildini og Fleyr í mansdeildini hava víst í hesum kappingarárinum, er neyvan nakar ivi um, at talan í báðum førum verður um útisigrar.

Hjá monnunum hevur ÍF verið stak illa fyri í ár. Kortini hevur bragdað hjá teimum onkuntíð, og neyvan hava teir gloymt hvussu teir vunnu á Mjølni í fyrru hálvu.

Um teir kunnu gera tað sama við Fleyr, er tó ivasamt, tí sum heild tykist Fleyr vera serstakliga vælkoyrandi, bara teir hava hugin at spæla.

Seinasta vikuskiftið var um reppið, at teir snávaðu móti SÍ, sum gjørdi meiri um seg, enn Fleyr hevði væntað, men í seinna hálvleiki tók Fleyr seg av álvara saman og tá var lítið at gera hjá SÍ.

Hetta vikuskiftið skal SÍ til Klaksvíkar at hitta Mjølnir. Bæði liðini taptu seinasta vikuskiftið, men tað er lítið at ivast í, at tað eru klaksvíkingar, sum kenna seg mest snýttar. Teir taptu seinasta javnbrótaran 15-13, og tað svíður.

Í fyrru hálvu leiktu liðini bæði ein sera spennandi dyst í Klaksvík, og tá var um reppið, at SÍ koppaði Mjølni.

Um tað verður líka spennandi hesaferð, ber illa til at spáa um, men talan er í hvussu er um tvey lið, sum hava hug at berjast fyri sigrinum.

**Mjølnir nakað fyri seg**
Sum nevnt skal Mjølnir inn í Kambsdal at hitta ÍF.

Fuglafjarðakvinnur hava víst, at tær hava evnini at spæla í meistaradeildini, hóast tær ikki rættuliga hava vant seg við ferðina í deildini. Tað hevði kanska eisini verið at kravt ov nógv av teimum, tí tær hava ikki havt bestu venjingarumstøðurnar í Fuglafirði - minni enn so.

Tí mugu vit rokna við, at Mjølnir enn einaferð ferð av vølli, sum sigursharri. Tær hava leikt væl tað sum farið er av kappingarárinum, og tað er ikki meiri enn hendingaferð, at tær hava tapt sett í dysti.

Seinasta vikuskiftið spældu tær móti Drátti, og tann dystin vunnu tær ruddiliga.

Sunnudagin skal Dráttur so til Havnar at royna seg. Um tað fer at ganga betur enn tað gjørdi seinasta vikuskiftið vita vit sjálvsagt ikki, men tað er vist, at vágagenturnar mugu takla seg saman, um so skal vera.

Heimaliðið er, eftir tí, sum Sosialurin skilir, komið fyri seg aftur eftir sjúku og annað forfall, og einki er at ivast í, at tær fara at gera sítt ítarsta fyri at vinna á Drátti.

Tað er ikki sannlíkt, at nakað av liðunum fer at fáa Mjølnir aftur, tí tær eru í einum klassa fyri seg. Kortini ræður um at vinna dystirnar sum eftir eru, tí har eru tvey sett av heiðursmerkjum eftir at berjast um.



## HM skráin

*Eftir at fótbóltsumboð okkara nú eru lidnir við fundarvirksemið niðri í Zürich, er skráin fyri komandi HM undankappingina hjá monnunum løgd*

Jákup Mørk

Aftr hesu ferð verður talan um nakrar tungar fótbóltsvikur, tá A-landslið okkara í fótbólti enn einaferð skal royna seg í altjóða høpi.

Hesu ferð stendur HM-undankappingin á skránni, og sum kunnugt komu Føroyar í bólk við Jugoslavia, Russland, Sweits, Slovenia og Luxemburg.

**Byrja heima**
Lagt verður fyri á heimavølli, tá føroyar hin 3. september í ár, skulu taka móti slovenska landsliðnum. Enn er ikki greitt, hvørt hesin dysturin verður leiktur á Tórsvølli ella inni á Svangaskarði.

Tveir aðrir dystir standa á skránni í ár, og verða hesir avgreddir innan fyri fimm dagar, tá Føroyar á útivølli skulu leika móti Sweits og Jugoslavi ávíkavist 7. og 10. oktober.

Komandi ár standa so ikki færri enn sjey altjóða landsdystir á skránni. Byrjað verður longu í mars mánaði, tá Føroyingar 24. og 28. í mánaðinum á útivølli skulu hitta Luxemburg og Russland.

Tað má metast at vera sera óheppið, at Føroysku leikararnir somikið tíðliga á árinum verða noyddir at leika landsdystirnar, og ikki minni óheppið kann tað tykjast, at ein av hesum dystum er móti Luxemburg, sum man vera tað liðið, ið vit hava bestar møguleikar fyri at fáa stig ímóti.

Føroyska kappingin er enn ikki byrjað um hetta mundið, og hóast landsliðið vanliga er á venjingarlegu um várið, so kann neyvan roknast við, at leikarar okkara eru so væl fyri, sum ynskiligt er, um hetta mundið.

**Tvær fótbóltsvikur**
Seinni á árinum fáa vit tvær rættuliga fótboltsvikur, tá vit á heimavølli skulu hitta Sweits og Jugoslavia dagarnar 2. og 6. juni, meðan Luxemburg og Russland vitja oyggjar okkara ávíkavist 1. og 5. september.

Hevur fótbóltssambandið verið óheppið í sambandi við útidystin móti Luxemburg, so má kortini sigast, at dysturin á heimavølli móti sama landið liggur sera væl fyri, sæð við føroyskum eygum.

Væntandi er heimliga kappingin tá komin somikið væl áleiðis, at tosað verður um seinastu og avgerandi umførini, soleiðis at leikararnir eru so væl fyri sum til ber til hesar dystir.

Seinasti dysturin í komandi undankapping er dysturin á útivølli móti Slovenia, og er hesin settur at vera 6. oktober 2001.

## Hópurin úttikin

*Nú fyrstu venjingarnar hjá hondbóltslandsliðnum standa fyri durum, hava landsliðsvenjararnir gjørt av, hvørjir leikarar í fyrsta umfarið skulu vera á hesum venjingum*

Jákup Mørk

Fyri stuttum boðaði hondbóltssambandi frá, at nú fór av álvara at koma gongd á aftur landsliðsarbeiðið hjá bæði monnum og kvinnum.

Fyrstu dystirnir eru longu lagdir til rættis, og nú byrja sjálvar landsliðsvenjingarnar. Teir báðir,

**17 leikarar**
Palli Joensen, sum tekur sær av venjingunum hjá manslandsliðnum, hevur tikið út 17 leikarar, sum umboða seks av liðunum í bestu deildini.

Viðmerkjast skal, at tað bert eru leikarar, sum í løtuni leika í Føroyum, sum eru við til venjingarnar. Venjararnir hava ikki enn havt møguleika at hugt eftir teimum leikarum, sum í løtuni royna seg uttanlands, og tískil er ikki óhugsandi, at onkur av hesum leikarum verður at síggja í hópinum, tá landsliðsarbeiðið er komið longur ávegis.

Hópurin til venjingarnar um vikuskiftið er annars hesin: Jóhan Danielsen og Artur Johansen úr StÍF; Óla Christian Djurhuus úr KÍF; Eli Müller, Harald Bjørgvin, Martin Hummeland, Sámal Joensen og Ingi Olsen úr VÍF; Jens Skipagøta og Bárður Brimvík úr H71; Heini Joensen og Áki Olsen úr Neistanum; Rúni Poulsen, Uni Wardum, Bjarni Wardum, Hannis Wardum og Hans Áki Dahl Christiansen úr Kyndli.

**Bruttohópar**
Hjá kvinnunum eru somuleiðis 17 leikarar úttiknar til bruttohópin, og eins og hjá monnunum er talan bert um leikarar úr heimligu kappingini.

Tá hetta eru fyrstu venjingarnar í hesum umfarinum, er talan um bruttohópar hjá bæði monnum og kvinnum, so møguleiki er sjálvsagt fyri, at onkur leikari verður sílaður frá, ella møguliga onkur legst afturat.

Tær 17 kvinnurnar, sum Sophus Dahl Christiansen, eru úr teimum seks fyrstudeildarliðunum í landinum, og er hópurin samansettur soleiðis:

Marita Hermansen, Rakul N. Joensen, Beinta Sørensen, Jórun Ludvig, Ann Hansen og Palma Petersen úr Kyndli; Hildur Sørensen, Helena Dam, Mildrid Jacobsen, Inga Danberg og Rúna Wardum úr Neistanum; Johanna Mikkelsen, Anna K. Samson, Annika Ljósstein, Simona Hansen, Joan Joensen, Sólvá Eystberg og Jastrid Gullaksen úr Stjørnuni; Jacklin Durhuus, Signhild Petersen, Randi Kúrberg og Eydna Johannesen úr VÍF; Sólrun Krosslág og Christina Holm úr VB; Sunrid Gleðisheygg og Mona Langgaard úr Tjaldur.

## Eru nú langt á odda

*Eftir at sjey tey fyrstu umførini av FM-kappingini í fyrstu deild eru leikt, er liðið hjá Farodane klárt á odda, og líkt er til, at tað longu nú er greitt, hvønn veg FM-heitið skal fara*

Vikuskiftið 7. og 8. januar vórðu trý umfør í FM kappingini fyri lið spæld í Bridgehúsinum í Havn.

Úrslitini av dystunum vóru hesi:

**1. deild**
Farodane - Per Kallsberg, 20-10
Shell - Árant Berjastein, 8-22
Jórun Johannesen - Carl Mikkelsen, 3-25
Shell - Farodane, 4-25
Jórun Johannesen - Per Kallsberg, 7-13
Carl Mikkelsen - Árant Berjastein, 21-9
Árant Berjastein - Per Kallsberg, 16-14
Shell - Carl Mikkelsen, 20-10
Farodane - Jórun Johannesen, 25-0

Omanfyristandandi úrslit høvdu við sær, at liðið hjá Farodane nú er klárt á odda í landskappingini.Støðan eftir 7 umfør er henda:

1. Farodane, 152
2. Per Kallsberg, 117
3. Árant Berjastein, 110
4. Carl Mikkelsen, 101
5. Shell, 80
6. Jórun Johannesen, 52

**2. deild**
Debes Christiansen - Ásla Weihe, 5-25
Gunnar Mouritsen - John Reid Skoralíð, 22-8
Jenis Tummasarson - Jens Pauli G. Nolsøe, 6-24
Vágar - Reimund Langgaard, 3-25
Danny Transport - Súsanna Martinsdóttir, 10-20
Jens Pauli G. Nolsøe - Gunnar Mouritsen, 10-20
Debes Christiansen - Vágar, 21-9
Reimund Langgaard - Jenis Tummasarson, 23-7
Ásla Weihe - Súsanna Martinsdóttir, 19-11
John Reid Skoralíð - Danny Transport, 16-14
Danny Transport - Jenis Tummasarson, 25-1
Reimund Langgaard - Ásla Weihe, 21-9
John Reid Skoralíð - Vágar, 25-4
Jens Pauli G. Nolsøe - Debes Christiansen, 11-19
Súsanna Martinsdóttir - Gunnar Mouritsen, 25-0

Støðan í aðru deild er nú:

1. Ásla Weihe 114
2. Debes Christiansen 111
3. Reimund Langgaard 101
4. Jens Pauli G. Nolsøe 99
5. Súsanna Martinsdóttir 97
6. Danny Transport 95
7. John Reid Skoralíð 94
8. Gunnar Mouritsen 91
9. Vágar 47
10. Jenis Tummasarson 36

Tey næstu umførini, sum er tey seinastu í innleiðandi umfarinum, verða leikt 25. og 26. februar á Oyrarbakka.

Tá ið innleiðandi umførini eru liðugt, fara tey fremstu liðini í 1. deild í eitt finalu-umfar. Tey bæði aftastu í 1. deild og tey bæði fremstu í 2. deild fara í ein bólk, har tey spæla um rættin at vera í 1. deild komandi kappingarár.

**Spæli hesu ferð**
Spælið her varð spælt, tá Villy Dam í heyst var í Bridgehúsinum og hevði skeið fyri bridgespælarar.

**E/NS**

| | | |
|---|---|---|
| | J2 | |
| | AKQ3 | |
| | 8765 | |
| | 432 | |
| AK965 | | 10873 |
| 764 | | J52 |
| KQ4 | | A9 |
| Q5 | | AKJ8 |
| | Q4 | |
| | 1098 | |
| | J1032 | |
| | 10976 | |

Vestan skuldi royna seg í 4sp. Tað sá ikki út til at vera nakar trupulleiki, um trumfurin sat væl, og tað gjørdi hann.

Men Oddmar Danielsen, sum sat Norðan, tók hj AKQ og sendi síðan tann fjórða hjartaran avstað.

Makkarin, Henriette Svenstrup, visti, at hetta var tann 13. hjartarin, og at hann vildi okkurt við hesum.

Hon trumfaði við spQ, og Oddmar kundi seinna taka tað setandi stikkið við spJ.

Eitt vakurt mótspæl.

**Føroya Bjór Simultan**
Tann næsta kappingin, FBS skipar fyri, er tann vælumtókta simultan kappingin, sum verður hildin á hvørjum árið.

Lagt verður til brots kl. 10.00 leygardagin, og verður leikt á hesum støðum:

Spælt verður í Suðuroy (enn ikki avgjørt hvar), í Klaksvík, í Fuglafirði og í Havn. Møguliga verður eisini spælt í Vágum. Tilmelding til simultankappingina ferð fram hjá teimum ymsu feløgunum.

**Steypakappingin**
Steypakappingin fer nú skjótt í gongd. FBS heitir á lið um at tekna seg til kappingina sum skjótast hjá Boga Simonsen, kappingarleiðara, · telefon 31 20 33.



*Farodane er nú klárt á odda í FM kappingini*